ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 9. februar 2010

# Jónleif givin í Vestmanna

**Venjarin, sum annars hevur vunnið tað mesta, har hann hevur verið, sær seg ikki føran fyri at lyfta VÍF av botnsessinum, og tí hevur hann latið stýrisvølin frá sær**




Jákup Mørk



Jónleif Sólsker er ikki longur venjari hjá besta mansliðnum hjá VÍF. Venjarin, sum áður hevur vunnið gull við StÍF og Kyndli, valdi í gjár at takka fyri seg. Eitt stig, sum hann heldur tænir liðnum best

Gongdin hjá VÍF hevur verið sera tung í ár, og mansliðið er í løtuni á niðurflytingarplássi í Atlantic Airways-deildini.

Sunnudagin tapti liðið stórt móti KÍF, og við tveimum vikum at fyrireika seg til næsta dyst, varð hetta av fleiri mett sum rætta løtan, um eitt venjaraskifti skuldi fremjast.

Í gjárkvøldið kom so tíðindaskriv frá VÍF, har felagið boðaði frá, at venjarin hevur ynskt at verða loystur úr starvi. Eitt ynski, sum leiðslan gekk honum á møti.

Nú uppsøgnin er avhendað, tykist tað vera ein hampuliga avkláraður Jónleif Sólsker, sum gevur sína meting um støðuna.

- Hatta er væl ein av teimum støðunum, har tað tænir liðnum best, um onkur annar sleppur fram-at. Eg kundi jú sjálvandi valt at halda fram og treiskast, men mín kensla er, at tað her og nú skal onkur broyting til.

- Samstundis eru 14 dagar til komandi dystin, so skuldi hetta stig-ið takast, so skuldi tað verða nú, og ikki tá tað bert vóru kanska tveir dystir eftir, sigur Jónleif Sólsker, sum ikki ivast í, at VÍF hevur liðið til at halda sær i deildini.

- Eg havi sagt tað fleiri ferðir, og mín meting er framveigs, at spælar-arnir eru alt ov góðir til at liggja har, sum teir liggja. Eg veit, hvat teir standa fyri, og eg síggi, hvat teir levera undir venjing. Men onkur-s-vegna samsvarar hetta als ikki við tað, sum verður avrikað til dystirnar, sigur Jónleif Sólsker.

---

# Bjørk og Sam bestu cross-rennararnir

**Bjørk Herup Olse og Sam Vang vunnu gull, tá kappast varð um FM í cross-renning**




Jákup Mørk

Kappingin varð hildin leygarmorgunin á Stovugólvinum, sum er økið norðanfyri Svangaskarð á Toftum.

Hjá monnunum var lagt upp til dyst millum Guttorm Sørensen, Sam Vang og afturvenda Hall Holm. Sam vann seinasta vikuskiftið í Streymnesi, meðan Guttorm bleiv nummar trý. Hallur luttók aftur í kapping fyri fyrstu ferð síðani síðsta summar.

Sam og Gutti løgdu seg á odda og fylgdust frá byrjan við Halli tætt í hølunum. Henda støða helt sær til sætta umfar, men tá var Hallur dragnaður eitt sindur. Tá teir fóru út á sjeynda umfar setti Sam ferðina upp og slapp leysur frá Guttormi, sum ikki megnaði at svara aftur. Tann støðan helt á mál og kundi Sam Vang á fyrsta sinni renna á um málstrikuna sum føroyameistari í cross. Guttorm bleiv nummar tvey og Hallur nummar trý.

Bjørk var einsamøll kvinna, men hon rann sera væl. Hjá veteranunum var tað Borgar Biskopstø, sum gjørdist føroyameistari frammanfyri Flemming Petersen og Poul Poulsen.

# 10 teir best løntu

**Tá talan er um samsýning fyri tað, sum verður avrikað á fótbóltsvøllinum, er Lionel Messi bæði tann besti og best lønti**




Heri Simonsen

Viðurkenda hollendska fótbóltsblaðið, Voetbal International hevur nú roknað seg fram til hvørjir fótbóltsspælarar hava tað hægstu lønarinntøkuna.

Yvirlitið fevnir bert um lønina spælarnir fáa frá sínum feløgum. Lýsingarinntøkur og persónligar sponsorinntøkur eru ikki roknaðar uppí.

Norska sjónvarpsstøðin, TV2 hevur umroknað yvirlitið til norskar krónur. Yvirlitið yvir teir 10 fótbóltsspælararnar sum fáa mest í løn í heiminum er hetta :

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Lionel Messi | Barcelona | 89,9 mió kr. |
| 2 | Samuel Eto'o | Inter | 85,8 mió kr. |
| 3 | Cristiano Ronaldo | Real Madrid | 81,9 mió kr. |
| 4 | Zlatan Ibrahimovic | Barcelona | 73,0 mió kr. |
| 5 | Kaká | Real Madrid | 73,0 mió kr. |
| 6 | John Terry | Chelsea | 73,0 mió kr. |
| 7 | Emmanuel Adebayor | Manchester City | 69,1 mió kr. |
| 8 | Fernando Torres | Liverpool | 64,0 mió kr. |
| 9 | Robinho | Manchester City | 63,0 mió kr. |
| 10 | Steven Gerrard | Liverpool | 61,0 mió kr. |

